Januar 2023

betri trygging

Tryggingartreytir

# *Djóratrygging - Hundur*

betri trygging

# Djóratrygging - Hundur


## A. Lógargrundarlag 3

## B. Felagstreytir 3

10.00 Hvat er tryggjað 3
11.00 Hvør er tryggjaður 3
12.00 Hvar fevnir tryggingin um 3
13.00 Tryggingarupphædd 3
14.00 Eigaraskifti 3
15.00 Meirvirðisgjald 3

## C. Tryggjaðir lutir 3

20.00 Djóralívstrygging 3
30.00 Djórasjúkutrygging 3

## D. Endurgjald 4

40.00 Djóralívstrygging 4
50.00 Djórasjúkutrygging 4

## E. Serstakar treytir 4

## F. Vanligar reglur 5

100.00 Tryggingargjald v.m. 5
101.00 Sjálvábyrgd 5
102.00 Prístalsjavning 5
103.00 Tíðarskeið og uppsøgn 5
104.00 Angringarrættur 5
105.00 Uppsøgn aftaná skaða 5
106.00 Broytingar av gjaldskránni og tryggingartreytunum 5
107.00 Tá tryggingin verður teknað 5
108.00 Vandabroytingar 5
109.00 Trygdarásetingar 5
110.00 Kríggj, nátturuvanlukkur o.tl. 6
112.00 Skaði, sum tann tryggjaði er atvoldin til við vilja ella í gáloysni 6
113.00 Dupulttrygging 6
114.00 Hvussu verður boðað frá skaða 6
115.00 Bjarging og varðveitsla 6
120.00 Ósemjur 6

# Djóratrygging - Hundur

## A. Lógargrundarlag

Fyri tryggingina eru galdandi, umframt hesar tryggingartreytir, møguligar sertreytir í tryggingarskjalinum og viðtøkur felagsins, tær í Føroyum galdandi lógir um tryggingaravtalur og tryggingarvirksemi.

## B. Felagstreytir

**10.00 Hvat er tryggjað**
Tryggingin fevnir um hundin, sum nevndur er í tryggingarskjalinum.

**11.00 Hvør er tryggjaður**
Tryggjaður er tryggingartakarin.

**12.00 Hvar fevnir tryggingin um**
Tryggingin er galdandi í Føroyum og á ferðum uttanlands í upp til 3 mánaðir. Tó er tryggingin ikki galdandi undir sjóvegis flutningi millum lond. Djórasjúkutryggingin er tó einans galdandi í Føroyum.

**13.00 Tryggingarupphædd**
Tryggingarupphæddin er ásett í tryggingarskjalinum. Endurgjaldið kann ikki fara upp um tryggingarupphæddina.

**14.00 Eigaraskifti**
Skiftir hundurin eigara, skal Betri Trygging hava boð um tað beinanvegin. Nýggjur eigari er tryggjaður í 14 dagar eftir eigaraskifti, um so er, at onnur trygging ikki er teknað. Er nevnda fráboðan ikki latin innan nevndu freist, er tryggingin burturdottin.

**15.00 Meirvirðisgjald**
Er tryggjaði mvg-skrásettur, verður endurgjald latið uttan meirvirðisgjald.

## C. Tryggjaðir lutir

Tryggingin kann fevna um djóralívstrygging og djórasjúku-trygging. Tað er nevnt í tryggingarskjalinum, hvat tín trygging fevnir um.

**20.00 Djóralívstrygging**
**20.00** Tryggingin veitir endurgjald, um hundurin:

**20.01** Doyr, sum fylgja av sjúku.

**20.02** Doyr, sum fylgja av vanlukkutilburði.

**20.03** Verður skaddur undir flutningi í Føroyum, av eldi ella av toruniðursláttri.

**20.04** Verður stolin. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at stuldurin verður fráboðaður løgregluni á staðnum beinanvegin, og at hundurin ikki er komin afturíaftur innan 4 vikur eftir, at hann er stolin.

**20.05** Verður avlívaður, tí djóralækni metir at tað er neyðugt. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at váttan fæst frá djóralækna um, at avlívingin er neyðug.

**20.06** Betri Tryggging hevur rætt til at krevja líkuppskurð. Um tryggingarfelagið krevur líkuppskurð, rindar Betri Trygging kostnaðin av hesum.

**20.07** Læknaváttanir, eftir at hundurin er tryggjaður, verða bert endurrindaðar, um Betri Trygging hevur biðið um tær.

**20.08** Í sambandi við skaða ella sjúku skal hundurin kannast av djóralækna skjótast gjørligt, og møgulig viðgerð skal fremjast beinanvegin.

**20.09** Skal hundurin avlívast, er tað ein treyt fyri endurgjaldi, at avlívingin verður framd av ella undir eftirlitið av útbúnum djóralækna. Skjalprógv fyri avlívingini skal sendast til Betri Trygging, áðrenn endurgjald kann verða latið.

**30.00 Djórasjúkutrygging**
**30.01** Í sambandi við brádliga sjúku ella skaða, veitir tryggingin endurgjald fyri:

1. Tá hundurin verður yvirkoyrdur
2. Beinbrot
3. Krossbandskaðar
4. Meniskskaðar
5. Knæskel, sum fer úr lið (patella luks)
6. Tannskaðar
7. Skaðar av álopi frá øðrum hundum
8. Keisaraskurð
9. Skurð í sambandi við lívmóðurbruna (pyometra)
10. Skurð fyri bróstkrabba
11. Skurð fyri bløðrustein
12. Skurð fyri svullir
13. Viðgerð av eygnalokum (entropion og extropion)
14. Viðgerð fyri "cherry eye"
15. Amputatión av eyga
16. Neyðugan heilivág, sum verður latin á staðnum.

# Djóratrygging - Hundur

**Undantøk og avmarkingar**
**30.02** Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri:

**1.** Fyribyrgjandi viðgerðir.

**2.** Skaðar og/ella vanlukkutilburðir, sum ikki henda brádliga.

**3.** Viðgerðir framdar uttanfyri Føroyar.

**4.** Aðrar skaðar enn teir, sum nevndir eru í grein 30.01.

## D. Endurgjaldið

**40.00 Djóralívstrygging**
**40.01** Endurgjaldið fyri hundin verður ásett á henda hátt:

**40.10** Tá hundurin er blivin 7 ár, verður endurgjaldið niðurskrivað sambært niðanfyri standandi talvu.

Niðurskrivingin ávirkar ikki tryggingargjaldið.

Endurgoldið verður soleiðis:

| | |
|---|---|
| 0–6 ár | 100% |
| 7 ár | 90% |
| 8 ár | 60% |
| 9 ár | 40% |
| 10 ár | 20% |
| 11 ár og eldri | 0% |

**40.11** Tryggingin fer úr gildi, tá hundurin er 11 ár.

**Undantøk og avmarkingar**
**40.20** Tryggingin veitir ikki endurgjald:

**1.** Fyri útreiðslur til kanningar, viðgerðir, eftirlit, heilivág, avlíving o.a. hjá djóralækna.

**2.** Um hundurin doyr orsakað av sjúku innan 60 dagar eftir, at tryggingin varð teknað. Tað er ongin bíðitíð, um hundurin doyr orsakað av skaða.

**3.** Tá sjúkan ella skaðin eru orsakaði av at tann, ið hevur hundin, hevur elvt ella viðvirkað til sjúkuna ella skaðan við vilja ella av grovum ósketni.

**4.** Um orsøkin til avlívingina er, at hundurin, orsakað av grovum ósketni hjá eigara, kom ov seint undir djóralækna hond.

**5.** Um hundurin doyr eftir at hava verið árendur av bili, og hundurin ikki var havdur í bandi, og hetta var orsøk til skaðan.

**6.** Um hundurin verður avlívaður orsakað av sálarligari sjúku ella stríðshuga.

**7.** Um hundurin verður avlívaður uttan nakra medisinska grundgeving.

**8.** Um hundurin doyr orsakað av sjúku, ið var til staðar, tá tryggingin varð teknað – hóast sjúkan ikki var staðfest, fyrr enn eftir at tryggingin kom í gildi.

**9.** Um hundurin doyr av sjúku, sum er íkomin, av tí at hundurin ikki er koppsettur sambært galdandi forskriftum, krøvum ella tilmælum frá djóralækna.

**10.** Fyri skaða, ið er orsakaður av ella verður verri av at:

**10.1** farið verður illa við hundinum.

**10.2** hundurin verður vanrøktur.

**10.3** hundurin verður overvaður.

**10.4** brot er framt á almennar forskriftir ella forskriftir/leiðbeiningar frá djóralækna

**40.30 Hundur horvin ella stolin**
Tryggingin veitir endurgjald við upp til 50% av endurgjaldinum, ið ásett er í § 40.10, um hundurin er horvin ella stolin og ikki er afturfunnin innan 3 mánaðir.

Tað er ein treyt fyri endurgjaldi at:
1. tilburðurin við tað sama verður fráboðaður løgregluni
2. leitað verður eftir hundinum
3. lýst verður alment eftir hundinum
4. tvey vitni skrivliga vátta, at hundurin er burtur. Endurgjald verður ikki latið, um hundurin er horvin orsaka av ólógligum ognarhaldi ella øðrum ólógligum viðurskiftum.

**50.00 Djórasjúkutrygging**
**50.01** Endurgoldið verður upp til kr. 10.000,00 fyri hvønn skaða.

**50.02** Endurgoldið verður í mesta lagi fyri 3 skaðar árliga.

**50.03** Tryggingin fer úr gildi, tá hundurin er 11 ár.

## E. Serstakar treytir

Eru serstakar treytir ásettar fyri tryggingina, sæst hetta í tryggingarskjalinum.

# Djóratrygging - Hundur

## F. Vanligar reglur

**100.00 Tryggingargjald v.m.**
**100.01** Tryggingargjaldið og avgreiðslugjald fella til gjaldingar hvørt ár frammanundan, um ikki annað er avtalað.

**100.02** Tryggingargjald og avgreiðslugjald vera kravd við inngjaldingarkorti. Tryggingarfelagið tilskilar sær rætt til at krevja postgjald ella annan innkrevjingarkostnað.

**100.03** Fyrsta gjaldið fellur til gjaldingar, tá tryggingin kemur í gildi, og seinni gjøld til ásettu gjalddagarnar.

**100.04** Verða tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldi ikki goldin rættstundis, verður áminningarskriv sent.

**100.05** Tryggingartakarin hevur skyldu til at rinda avgreiðslu-gjøld fyri áminningarskriv.

**100.06** Verða tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið fram-vegis ikki goldin, verður tryggingin strikað.

**101.00 Sjálvábyrgd**
**101.01** Tað er tilskilað í tryggingarskjalinum um tryggingin er teknað við sjálvábyrgd.

**102.00 Prístalsjavning**
**102.01** Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya. Javnað verður tó altíð við í minsta lagi 2 prosentum í mun til árið fyri. Prístals-javningin verður framd høvuðsgjalddagin.

**102.02** Heldur útgávan av almenna brúkaraprístalinum uppat, verður tryggingin prístalsjavnað við prístali, ið Betri Trygging ger/góðtekur.

**103.00 Tíðarskeið og uppsøgn**
**103.01** Tryggingin stendur við, til tryggingartakarin ella tryggingarfelagið skrivliga sigur hana upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

**104.00 Angringarrættur (fyri privatar tryggingar)**
**104.01** Tryggingingartakarin kann strika tryggingina frá tekningardegnum, um tryggingarfelagið fær skrivliga fráboðan um tað, áðrenn 14 dagar eru farnir. Hetta merkir, at støðan verður, sum var tryggingin als ikki teknað. Møguligar útreiðslur, sum felagið hevur havt av tryggingini, kunnu krevjast afturgoldnar.

**Undantøk og avmarkingar**
**1.** Angringarrætturin er ikki galdandi fyri tryggingar, ið eru teknaðar fyri eitt tíðarskeið, ið er ein mánaði ella styttri.

**105.00 Uppsøgn aftaná skaða**
**105.01** Uttan mun til tær í § 103.00 nevndu freistir, hava bæði tryggingarfelagið og tryggingartakarin rætt til at siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um hetta verður gjørt innan 14 dagar eftir, at ein skaði er goldin ella avvístur.

**106.00 Broytingar av gjaldskránni og tryggingartreytunum**
**106.01** Ger tryggingarfelagið broytingar í gjaldskrá síni, ella tryggingartreytirnar verða broyttar, hevur tryggingarfelagið rætt til við 30 daga freist til mánaðarlok at seta nevndu broytingar í verk.

**106.02** Vil tryggingartakarin ikki góðtaka eina hækking av tryggingargjaldinum ella strangari tryggingartreytir, kann tryggingartakarin krevja tryggingina setta úr gildi. Tryggingartakarin hevur tá skyldu at boða tryggingarfelagnum skrivliga frá hesum 14 dagar áðrenn gjalddag.

**107.00 Tá tryggingin verður teknað**
**107.01** Tryggingartakarin hevur ábyrgdina av, at tær í tryggingarskjalinum nevndu upplýsingar eru rættar.

**107.02** Skeivar upplýsingar kunnu, sambært tryggingar-avtalulógini §§ 4-10 føra við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður, ella at endurgjaldið fellur burtur

**108.00 Vandabroytingar**
Eru broytingar í nýtsluni av hundinum, skal Betri Trygging hava fráboðan um tað við tað sama. Verður hetta ikki fráboðað, kann tað hava við sær, at eitt møguligt endurgjald verður avmarkað ella fellur heilt burtur.

**109.00 Trygdarásetingar**
Eru sett forboð og/ella krøv í tryggingarskjalinum, sum skulu vera hildin ella lokin, áðrenn skaðin hendir, til tess at fyribyrgja ella minka skaðan, og hevur tann tryggjaði ella onnur, ið hava skyldu at ansa eftir, at hesi krøv verða fylgd, ikki syrgt fyri hesum, hevur tann tryggjaði bert krøv móti Betri Trygging, um og tá prógvast kann, at skaðin ikki hendi ella gjørdist størri av tí, at hesi forboð og/ella krøv ikki eru hildin ella lokin. Sí tryggingaravtalulógina § 51.

**110.00 Kríggj, náttúruvanlukkur o.tl.**
**110.01** Tryggingin fevnir ikki um skaða ella útreiðslur av skaða, ið eru ein beinleiðis ella óbeinleiðis fylgja av ella standa í sambandi við:

**a)** kríggj, krígslíknandi viðurskifti, borgarakríggj, hendingar, ið standast av at gera seg inn á uttanveltað, uppreistur ella borgarligan ófrið,

# Djóratrygging - Hundur

**b)** NBCR-yvirgang (Nuclear, Biological, Chemical & Radiological). Við yvirgang er at skilja ein gerð/atgerð, íroknað - men ikki avmarkað til - brúk av makt og/ella harðskapi ella hóttan um, at makt og/ella harðskapur fer at vera nýttur, framd av einum ella fleiri persónum, uttan mun til um teir virka einsamallir ella í sambandi við ella í felag við ella vegna ein ella fleiri felagsskap/ir og/ella stjórnir og/ella myndugleikar, framd við politiskum, átrúnaðarligum, ideologiskum ella etniskum endamáli ella grundgeving, íroknað endamálinum at ávirka eina stjórn og/ella ein millumlandafelagsskap og/ella at skapa ótta í almenninginum ella parti av almenninginum. Í hesum sambandi veitir Betri Trygging ikki endurgjald fyri NBCRyvirgang ella sokallaðar dálkaðar bumbur: Við dálkaðar bumbur er at skilja bumbur, rakettir o.tl. løddar við vanligum (konventionellum) spreingievni og dálkaðar við geislavirknum tilfari. Hesar bumbur verða vanliga nevndar dirty bombs. Sama er galdandi fyri bumbur, sum eru dálkaðar við evnafrøðiligum lívfrøðiligum ella bakteriufrøðiligum tilfari. Bumburnar gera skaða bæði við fysisku ávirkanini av sjálvum bumbubrestinum og við, at dálkað tilfar verður spjatt yvir eitt størri ella minni øki.

**c)** jarðskjálvta ella aðrar nátturuvanlukkur,

**d)** hendingar, ið standast av atom- og kjarnorkuroynd um av einum og hvørjum slag og/ella geislavirknum burturkasti, annaðhvørt slíkur skaði berst á í friðar- ella krígstíð.

**110.02** Skaði av kjarnorku til vanligt ídnaðarligt, læknafrøðiligt ella vísindaligt endamál verður tó endurgoldin, um so er, at galdandi fyriskipanir hava verið fylgdar og ikki hava staðið í sambandi við reaktor– ella acceleratorvirksemi.

**110.03** Um so er, at nevnda eftirlit verður nokta Betri Trygging, hevur Betri Trygging rætt til at strika tryggingina.

**112.00 Skaði, sum tann tryggjaði er atvoldin til við vilja ella í gáloysni**
**112.01** Um tryggjaði við vilja ella av grovum ósketni hevur voldað skaða, kann hann sambært tryggingaravtalulógini §§ 18-19 eftir umstøðunum missa rættin til endurgjald.

**112.02** Sama er galdandi, um skaðin er framdur av hjúnafelaga, ið livir saman við tryggjaða, sí tryggingaravtalulógina § 85.

**112.03** Hevur tryggjaði voldað skaðan av ósketni, ið ikki kann kallast grovt, ella í fyllskapi ella undir ávirkan av rúsandi ella doyvandi evnum, hevur tryggingarfelagið rætt til at avmarka endurgjaldið við upp til 5 %, sí tryggingaravtalulógina § 20.

**113.00 Dupulttrygging**
**113.01** Eru somu lutir og áhugamál tryggjað ímóti sama vanda í øðrum felag, skal boðast Betri Trygging frá hesum, samstundis sum skaðin eisini skal boðast hinum felagnum.

**113.02** Hevur hitt felagið tikið fyrivarni um, at einki endurgjald verður latið, ella at hetta verður avmarkað, um so er, at trygging er teknað í meira enn einum felagi, eru somu fyrivarni galdandi fyri hesa trygging. Endurgjaldið verður tá at gjalda lutfallsliga av feløgunum.

**114.00 Hvussu verður boðað frá skaða?**
**114.01** Ein og hvør skaði skal beinanvegin skrivliga boðast til tryggingarfelagið. Er talan um tjóvarí ella herverk, skal samstundis boðast løgregluni frá, og kvittan fyri hesa fráboðan sendast Betri Trygging. Seinking kann hava til fylgju, at endurgjaldið verður avmarkað ella fellur burtur.

**114.02** Fráboðast skal beinleiðis til Betri Trygging.

**115.00 Bjarging og varðveitsla**
**115.01** Hin tryggjaði skal, tá ið skaði er hendur ella ein skaði er um at taka seg upp – eftir besta førimuni – avmarka ella fyribyrgja skaðan.

**120.0 Ósemjur**
**120.01** Eru viðurskifti við felagið, ið tryggingartakarin er ónøgdur við, er hann vælkomin til, í fyrsta umfari, at seta seg í samband við okkum aftur. Vanliga mannagongdin er, at hann setir seg í samband við ta deildina, hann er ósamdur við.

**120.02** Talan kann vera um ymisk viðurskifti, t.d. í sambandi við, at trygging verður teknað, í sambandi við eina skaðaavgreiðslu ella onnur viðurskifti við felagið.

**120.03** Kann málið verða loyst á henda hátt, er tað tann besta, mest einfalda og skjótasta loysnin fyri báðar partar.

**120.04** Um semja ikki fæst, eru aðrir møguleikar at fara víðari við málinum, sí §§ 120.10 og 120.20.

**120.10 Innanhýsis kæruviðgerin hjá Betri Trygging**
**120.11** Kærast kann til innanhýsis kæruviðgeran hjá Betri Trygging.

**120.12** Kæran skal sendast skrivliga til felagið. Tað skal í skrivinum vera greitt, at talan er um kæru til kæruviðgeran. Kæran kann sendast við vanligum brævi ella við teldubrævi.

**120.13** Í kæruni skal greiðast frá, hvat tað er, sum ósemjan snýr seg um. Tað er ikki neyðugt at leggja tað samskiftið við, sum er farið fram skrivliga við tryggingarfelagið, men nýggj sjónarmið kunnu førast fram í kæruni.

# Djóratrygging - Hundur

**120.14** Kæran skal, tá talan er um vanligan post, sendast til:

Betri Trygging P/F
Kæruviðgerin
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella við teldubrævi til: betri@trygging.fo
Teldubrævið skal stílast til kæruviðgeran.

**120.20 Kærunevndin**
**120.21** Kærast kann beinleiðis til donsku kærunevndina, uttan fyrst at kæra til innanhýsis kæruviðgeran.

**120.22** Skrivlig kæra – skrivað á donskum – skal sendast kærunevndini, saman við ávísum gjaldi. Um tryggingartakarin, heilt ella partvíst fær viðhald í kæruni, verður gjaldið afturrindað.

**120.23** Á heimasíðuni hjá Ankenævnet for Forsikring er frágreiðing um, hvussu farast skal fram, tá kært verður.

Sí: http://www.ankeforsikring.dk

**120.24** Um ivamál eru viðvíkjandi, hvussu kært verður til Ankenævnet for Forsikring, sendir felagið eftir umbøn oyðublað og faldara hesum viðvíkjandi. Felagið er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

**120.25** Kæran skal sendast til:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaardsgade 2
Postbox 360
1572 København V.
Tlf. nr.: 0045 33 15 89 00
Fax nr.: 0045 33 15 89 10